LM-088/2023

Sylgiskjal 3.

FØROYSKIR SÁLARFRØÐINGAR

Tórshavn 5.2.24

**Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar vilja takka fyri høvið at fáa uppskotið um dagførda Fosturtøkulóg til hoyringar.**

Í høvuðsheitum tekur Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar fult undir við endurskoðanini av fosturtøkulóggávuni, sum í mong ár hevur verið ótíðarhóskandi. Endurskoðaða uppskotið er sostatt eitt frambrot fyri rættindini og avgerðarrættin hjá einstøku kvinnuni. Vit hava tó nakrar viðmerkingar til uppskotið, soleiðis sum hetta er orðað.

Í §7 stendur, at "*kvinnan skal hava í boði óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu fyri og eftir inntrivið. Ráðgevingin skal m.a. fevna um møguleikarnar fyri stuðli til at fullføra viðgongutíðina og fyri stuðli eftir, at barnið er føtt*". Harumframt verður í uppskotinum víst á, at ætlanin er "*at skipa eitt tilboð, har kvinnur, sum umhugsa fosturtøku kunnu venda sær fyri at fáa ráðgeving, vegleiðing og kunning frá fakfólki, um tær meta at tørvur er á tí... Endamálið við einum slíkum tilboði er at geva kvinnuni neyðuga kunning og stuðul til sjálv at kunna taka eina vælgrundaða avgerð um, hvørt fosturtøka skal fremjast ella ikki*". Felagið heilsar slíkum tilboðið vælkomnum, og vit síggja tað ógvuliga viðkomandi at hugsa ein sálarfrøðing inn í eitt tílíkt. Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar vil við hesum argumentera fyri, at fáir fakbólkar eru betri skikkaðir til at veita slíkar stuðulssamrøður, hvat fyrimunir og vansar við slíkari avgerð viðvíkur – og hvørjar avleiðingar avgerðin kann fáa, óansæð um avgerðin verður tikin um at fullføra barnsburðin ella bróta hann av. Felagið skjýtur tí upp, at sálarfrøðingur verður settur á at veita slíkar stuðulssamrøður.

Samráðið og treytirnar fyri at fáa fosturtøku eru enn eitt øki, har vit í felagnum ímynda okkum, at sálarfrøðilig innspark kunnu geva íkast til og breiðka perspektivini í mun til støðuna hjá ungu gentuni. Ætlanin í dag er at seta eitt samráð við trimum persónum við ávikavist læknafakligari og løgfrøðiligari/sosialfakligari bakgrund. Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar vilja við hesum vísa á tað gagnliga í at hava ein við sálarfrøðing við í samráðnum. Hetta fyri at tryggja okkum, at ikki bert læknalig og løgfrøðilig atlit verða tikin til avgerðina um fosturtøku ella ei, men eisini kenslulig. Á barna- og ungdómsøkinum eru sálarfrøðingar føst umboð sum barnaserkøn – innan fyri Føroya Rætt og á Føroya Kærustovni í mun til t.d. umsorganaryvirtøkur. Sálarfrøðingar hava serførleika til at meta um støðuna hjá bæði foreldrum, vaksnum og børnum.

Í §9 stendur, at unga kvinnan skal hava loyvið frá foreldrunum, um hon er undir 18 ár, umframt at samráðið kann loyva einum manglandi samtykki og geva loyvið til fosturtøku, um serligar umstøður tala fyri hesum. Innan mong onnur øki hava ung millum 15-18 ár rætt til partvíst samtykki. Praksis innan heilsuverkið er eisini í mongum førum soleiðis, at foreldur ikki kunnu tvinga ein ungan til nakra heilsufrøðiliga tænastu, um tann ungi ikki ynskir hetta. Lógin um Barnavernd sigur eisini, at Barnaverndartænastur ikki kunnu

*The Faroese Psychological Association*
box 167 - FO-110 Tórshavn
website: http://www.psykolog.fo/

FØROYSKIR SÁLARFRØÐINGAR

seta átøk í verk uttan samtykki frá ungum, ið eru vorðin 15 ár. Tað ber sostatt ikki til at ávísa børn til kanningar, útgreiningar ella viðgerð annars, um tann ungi setur seg upp ímóti hesum. Praksis í Danmark er felagnum kunnugt soleiðis, at tann unga kvinnan millum 15-18 ár hevur rætt til at taka avgerð um fosturtøku, men at foreldrini eisini hava rætt til at kunnast um hesa Tí hava vit í Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar ilt við at skilja, hví talan skal vera um aðra praksis innan fosturtøkulóggávuna.avgerð. Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar vil við hesum argumentera fyri, at ein slík skipan hevði stilla ungu kvinnuna betri í mun til rættindi enn tað, ið lógaruppskotið leggur upp til, soleiðis sum tað sær út í dag.

Í uppskotinum stendur eisini, at "*tað er ein stór og trupul avgerð at taka, hvørt ein fosturtøka skal fremjast ella ikki. Talan er um eina so týðandi avgerð, sum kann fáa avleiðingar seinni í lívinum. Eitt krav um, at tann ella tey, sum hava foreldramyndugleika skulu geva samtykki til eina fosturtøku, er við til at skapa eina stuðlandi og vegleiðandi rammu um gentuna ella ta ungu kvinnuna og møguliga lætta um avgerðartilgongdina. Hetta er eisini við til at tryggja og verja vælveruna hjá gentuni ella tí ungu kvinnuni*". Fyri nógvar gentur og ungar kvinnur er omanfyristandandi útsøgn helst galdandi – og lukkutíð fyri tað. Nógvar vilja fáa nøktandi og hóskandi stuðul úr heiminum. Fyri summar kann tað tó vera beinleiðis katastrofalt, at foreldramyndugleikin skal samtykkja til fosturtøku. Summar ungar kvinnur í teirra allarhelst lívsins størstu kreppu fara at verða møttar við fordøming og øllum øðrum enn stuðlan, skulu tær venda sær til foreldrini at fáa eina undirskrift. Tí metir felagið, at allar gentur høvdu verið betri stillaðar, um tær sjálvar høvdu rætt at samtykkja til fosturtøku longu frá 15 ára aldri, og at tær sjálvar kunnu takast uppá ráð í mun til kunningina til foreldrini. Hetta út frá einari argumentatión, at prátið við heimið ikki skal økja um byrðuna og trýstið, unga kvinnan longu stendur í.

"*Ætlanin er eisini, at ráðgevingin hevur eina sjálvstøðuga heimasíðu við viðkomandi kunning, svar upp á ofta settir spurningar o.s.fr., soleiðis at borgarar sjálvir kunnu finna svar upp á teir spurningar, teir sita við, uttan at skulu ringja ella møta persónliga á einum ávísum stað. Um kvinnan hevur tørv á einari persónligari samrøðu, kann hetta verða skipað eftir nærri avtalu*" og "*Hesin leistur byggir á verandi ráðgeving hjá Gigni. Ætlanin er, at ráðgevingin verður skipað sum ein sjálvstøðug fosturtøkuráðgeving undir Heilsutrygd. Tað verða heilsufrøðingar, sum eru fosturtøkuráðgevar hjá Gigni, sum svara telefonini.*" Í mun til ráðgevingarpartin verður mett, at tað er av týdningi at talan er um eina óhefta ráðgeving, soleiðis at kvinnur ótarnaðar kunnu søkja sær ráðgeving. Tikið verður undir við, at sálarfrøðingar eisini verður fakbólkur innan hesa ráðgeving.

Vegna Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar, Signhild Johannesen, forkvinna

Signhild Johannesen

***The Faroese Psychological Association***
**box 167 - FO-110 Tórshavn**
**website: http://www.psykolog.fo/**